# 10 ár við RÁS 2 ...títt radio

Í dag, mánadagin 14. desember kl. 12, vóru tíggju ár liðin síðan útvarpsstøðin Rás2 fyrstu ferð fór í luftina við tíðindadamanninum Sonna Smith í studio.

Rás2 byrjaði sum ein nýggj radiostøð við nýggjari útgerð, í somu hølum sum Atlantic Radio áður hevði hildið til, við Hoyvíksvegin í Havn.

Eigarar vóru feløgini Sp/f JPS v.Janusi Rein, Peturi J. Samuelsen og Suna Jacobsen, og ADJ-Sound, sum er eitt felag hjá Peturi Jacobsen, sum var stjóri á útvarpsstøðini. Í februar 2004 flutti radiostøðin til Søldarfirðar.

Í september 2007 keypti P/F Miðlavarpið, sum er eitt dóttirfelag hjá Sosialinum, útvarpsstøðina Rás2. Síðan mánadagin 5. oktober 2007 hevur støðin hildið til í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Stjóri á Rás2 er Jonhard Hammer.

*-red*



*Myndir er tikin á 10 ára stovningardegnum hjá Rás2, f.v.: Birgir Sondum, sum eina tíð hevði sendingina "Birgir beinleiðis" á rásini, Petur Jacobsen, fyrrverandi stjóri, og Sonne Smith, sum var tíðindamaður á Rás2 í mong ár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Petur Jacobsen til arbeiðis sum stjóri á Rás2*




*Jonhard Hammer, stjóri á Rás2, sum heldur til í Miðlahúsinum í Vágsbotni*

**Framhald av navnasíðunum er á síðu 40**

# MERKISDAGAR

**75 ára føðingardagur**
Marita Arge Magnussen, Tórshavn, verður 75 ár 18. des. Dagurin verður hildin leygardagin 19. des. í Sjónleikarahúsinum frá kl. 11-15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 7. des. hava Anna og Kári Egholm Jacobsen, Glyvrar, verið gift í 25 ár. Veitsla verður 19. des. í Bygdarhúsinum í Leirvík fyri innbodnum.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda við bæði, Pálin og Henry Olsen, Rituvík okkara silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við veitslu í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tit, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 219134 (Henry) ella 223534 (Pálin). Til ber eisini at senda ein teldupost: henry-o@olivant.fo ella palin.olsen@skulin.fo áðrenn 15. desember.

**Diamantbrúdleyp**
Týsdagin 15. des. hava Helena og Kristian Poulsen, Skála, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**Prógv**
Christina Elisabeth Mørkøre hevur fingið prógv sum MA in Performance (Musical Theatre Option) á Mountview Academy of Theatre Arts, London.

## Dagurin

**14. desember. Crispus.**
Óvist er hvønn navnið sipar til, kanska biskupin Crispina, sum varð tikin av døgum umleið ár 300.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Diamantbrúðleyp



Týsdagin 15. desember 2009 hava Helena og Kristian Poulsen, Skála diamantbrúðleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.